Stór KT-messa:

# Ein ferð inn í framtíðina

**Fríggjadagin og leygardagin fer tann fyrsti KT-stevnan av sínum slag av bakkastokki í Norðurlandahúsinum í Havn. Stevnan savnar hundraðtals fólk innan KT-ídnaðin. Stevnan hevur lagt seg eftir at hyggja inn í framtíðina**

STEVNA
*Heri á Rógvi*

Í dag, fríggjadagin og í morgin leygardagin verður Norðurlandahúsið karmur um eina stóra KT-stevnu ella KT messu, sum onkur vil kalla tað.

Stevnan hevur fingið KT 2002, og tað er her, at ein og hvør, ið kann seta seg sjálvan ella sína fyritøku í sambandi við KT, verður dagarnar 19. og 20. apríl.

Á skránni hesa báðar dagarnar er eitt ótal av framløgum og fyrilestrum. So at siga allar KT-fyritøkur í Føroyum vera við til stevnuna, og tað skortar so avgjørt ikki við tiltøkum. Tjúgu fyritøkur fara at sýna fram, hvat tær hava at bjóða uppá, og tað er sama tal av fyrilestrum hjá teimum vitjandi at lurta eftir teir báðar dagarnar. Áhugin er eisini risastórur fyri stevnuni. Tann fyrri dagin er fult teknað, 600 fólk.

Stevnan er soleiðis skipað, at tann fyrri dagurin er ein sokallaður business to business, har fólk skule melda seg til.

Seinni daguri er so opin fyri øllum teimum, ið hava áhuga at síggja. Kostnaðurin fyri hesi er 80 kr.

– Endamálið er, at fáa meira vitan um, hvat framtíðin hevur at bjóða. Stevnan krevur nógva fyrireiking, men vit halda hana vera neyðuga, um vit skulu koma víðari, sigur Esbern Hansen. Hann er formaður fyri KT-felagið, sum skipar fyri messuni.



*Erik E. Thomsen v.m. og Esbern Hansen hava verið við til at fyrireika KT-messuna, KT 2002, ið verður fríggjadagin og leygardagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Inn í framtíðina

Temaið á messuni verður framtíðin. Lýsingarnar undan stevnuni hava koyrt við slagorðunum ein ferð inn í framtíðina.

Tað gongur vanliga rættiliga skjótt innan KT-vinnuna, og tað er tí alneyðugt at fylgja væl við.

Fyrilestrarhaldarar eru eisini komnir uttanlands. Millum annað hevur Microsoft eitt umboð við á stevnuni.

Esbern Hansen sigur seg vóna at síggja nógv fólk á messuna, ið enn líktist einum verri puslispælið, tá vit vitjaðu, men tað varð lovað, at alt skuldi koma uppá pláss, tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum setur stevnuna fríggjarmorgunin kl. 10.00.

# Telduspæl um oljuleiting

**Oljufelagið Agip hevur tikið stig til at gera eitt telduspæl um oljuleiting. Spælið, sum hevur fingið navnið Xplore, er framleitt burturav í Føroyum. Ætlanin er, at føroyskir miðnámsnæmingar skulu fara at royna spælið komandi heyst, tá skipað verður fyri einari kapping**

SPÆL
*Heri á Rógvi*

Eitt nýtt føroyskt telduspæl hevur sæð dagsins ljós. Xplore er navnið á tí. Tað er oljufelagið Agip, sum hevur tikið stig til at gera spælið. Italska oljufelagið er við í oljuleitingini undir í Føroyum, og teir hava eisini bundið seg til at lata pengar til førleikamenning. Ein partur av hesum peningi verður nýttur til at gera hetta nýggja telduspælið.

Spælið eitur Xplore við undirheitinum Petroleum Exploration Business Game.

– Endamálið við spælinum er at geva miðnámsskúlanæmingum innlit í leiting eftir kolvetni, sigur Ólavur Gregersen, sum er vinnuráðgevi hjá Agip í Føroyum. Hann hevur samskipað hesa verkætlanina fyri Agip.



*Tvær ferðir Ólavur. Ellefsen vinstrumegin og Gregersen høgrumegin. Teir hava í felag fingið gjørt eitt nýtt telduspæl, ið kallast fyri Xplore, ið hyggur nærri at oljuleiting.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Talan er mestsum um føroysk framleiðslu burturav. Ávísir útlendskir konsulentar hava verið knýttir at verkætlanini. Agip hevur sum sagt staðið fyri og fíggja verkætlanina. KT-fyritøkan Tøkni hevur staðið fyri tí mesta av arbeiðinum í sambandi at útbyggja konseptið og leggja spælið til rættis. Føroyska fyritøkan Sansir luttekur eisini í verkætlanini. Eisini hevur Atlants Kolvetni havt ein fingur við í spælinum, og oljumálastýrið hevur eisini givið spælinum teirra vælsignilsi.

### Teld og borð

Spælið er eitt telduspæl. Tað er tó ikki meira eitt telduspæl enn, at sjálv spæliplátan er verulig ella fysisk. Henda góða spæliplátan er hornasteinurin í spælinum. Hon ímyndar eitt eftirgjørt oyggjaland, sum ikki er veruligt, men set í eitt samanhang, ið minnir um veruleikan.

Tað er so frætt veruleikakent, at olju er at finna í økinum rundanum oyggjarnar. Eins og í einum oyggjalandi í Norður Atlantshavi, so verður eisini farið ígongd við at leita eftir olju. Spælararnir, sum eru tríggir á hvørjum liði, skulu gjøgnum allar teir ymsu fasurnar í sambandi við oljuleiting. Teir skulu bæði gera seismiskar kanningar, ganga saman í samtøk, bjóða uppá loyvi og mangt annað. Stutt sagt: alt tað, ið tú skalt gera í offshore leiting eftir olju.

– Tær nýtist ongan førleika, áðrenn tú fer í holt við spæl. Spælið er bygt teirri uppskrift, at tú lærir, meðan tú spælir, sigur Òlaver Gregersen.

Spælið gongur alt fyri seg gjøgnum alnetið, men við einari fysiskari spæliplátu. Luttakararnir skulu loysa nógvar avbjóðingar, sum eru tiknar úr veruleikanum.

– Tað krevur bæði vitan og held, um tú skalt vinna í spælinum. Tað er sjálvandi best við nógvari vitan, sigur Ólavur Ellefsen, sum eigur og rekur Tøkni.

– Vit vóna, at næmingarnir fara at taka vælímóti hesum. Hetta spælið meta vit inniheldur rættiliga nógv av tí, sum vit seta í samband við oljuleitingar av hesum slag, sigur Ólavur Gregersen,

### Kapping

Sum áður nevnt er endamálið við spælinum at geva miðnámsskúlanæmingum innlit í leiting eftir kolvetni.

Í hesum sambandi skipa fyri einari kapping. Í næstum fara fólk at royndarkoyra spælið, men tann stóra ætlanin er, at miðnámsskúlanæmingar skulu kappast í spælinu. Ætlanin er, at kappingi verður millum tretivu lið, sum eru mannað av trimum fólkum á hvørjum liði. Kappingin fer fram yvir tríggjar vikur, og tað er so ætlanin, at vinnarin fær eina góða virðisløn. Ætlanin er, at kappingin fer av bakkastokki komandi heyst. Vinnarin er tann bólkur, ið eftir trý útbjóðingarumfør hevur funnið størsta samlaða virðið av olju.

Kostnaðurin av spælinum táttar í eina millión kr., og hesir eru fyri tað nógva nýttir í Føroyum.





*Kósir við seismiskum kanningum undir Føroyum 1993 – 1998*

# Fiskur venist við seismikk

**Einki bendir á, at fiskur verður stygdur av Landgrunninum orsakað av seismiskum virksemi. Hetta sigur Fiskirannsóknarstovan í bóklingi, sum greiðir frá árinunum seismiskar kanningar hava á fiskiskapin**

FISKIVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Fiskirannsóknarstovan hevur givið út bóklingin "Seismikkur og fiskiskapur – Hvat siga fiskimenn?". Fiskirannsóknarstovan kannaði í 1999 árinini á fiskiskapin undir Føroyum av seismiskari skjóting, og er tað úrslitið av hesum, ið er greitt frá í bóklinginum.

Áhugin fyri at leita eftir olju undir Føroyum er vaksandi, og hevur hetta tí sjálvsagt eisini eina ávirkan á tali av seismiskum kanningum, ið verða gjørdar undir Føroyum. Síðani 1993 eru seismiskar kanningar gjørdar á hvørjum ári. Fiskimenn hava gjørt vart við, at seismisku kanningarnar tarna fiskiskapin, og halda teir eisini, at hetta styggir fiskin, og at fiskiskapurin versnar.

Eftir úrslitunum hjá Fiskisannsóknarstovuni at døma, bendir onki á, at fiskur verður stygdur burtur, tí seismiskar kanningar verða gjørdar. Henda niðurstøðan er tikin út frá veiðudagbókunum hjá skipunum. Ein møgulig ávirkan varðar bert í stutta tíð, og miðalveiðan, hvønn dag, broytist av náttúrligum orsøkum.

Seismiskar kanningar hava verið gjørdar javnan síðani 1995. Fiskur kann venjast við ljóð, og kann hetta verða ein orsøk til, at í 1997 sæst lítil ávirkan á fiskiskapin. Ljóðið frá seismisku kanningunum hoyrist víða, og kann fiskurin tey tvey árini talan er um hava vant seg við ljóðið, og harvið hava fyrstu seismisku kanningarnar stygt meira fisk enn tær seinnu.

***kelda:***
*Seismikkur og fiskiskapur – Hvat siga fiskimenn?*

Ert tú bitin av web's :-)



Ert tú internetforritari og leitar eftir avbjóðingum? So leita vit eftir tær.

Sansir eru eitt samskiftisvirki, har marknaðarføring á internetinum fær ein alsamt størri leiklut.

Vit eru í millum annað í ferð við at menna eina CMS-skipan (Content Management System), ið hevur víst seg at vera væl umtókt. Vit arbeiða við dynamiskum loysnum, sum eru skraddaraseymaðar til virki og felagsskapir. Tín uppgáva verður at vera við til at menna skipanina og gera serligar loysnir til einstaka virkið.

Tú hevur viðkomandi útbúgving, ert datamatikari, datanom ella líknandi. Tú hevur kunnleika til ASP og SQL, og tað er ein fyrimunur, um tú kennir til COM-komponentar og dugir at handfara Visual InterDev. Royndir á økinum eru eisini ein fyrimunur, men ongin treyt.

Tú fært góðar møguleikar fyri menning – bæði fakliga og menniskjaliga. Vit kunnu bjóða tær skeiðmøguleikar í tann mun, sum tað hóskar inn í arbeiðsgongdina.

Tú skalt vera ágrýtin, røkin og líka arbeiðssamur sum ein vespa. Vilt tú bjóða tínum kunnleika av, og hevur tú hug at menna teg víðari í einum livandi umhvørvi saman við dugnaligum fólkum, so lat okkum hoyra frá tær.

Send okkum umsókn við prógvum og møguligum viðmælum innan 1. juni. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum og fáa meira at vita um starvið.

SANSIR

PF. SANSIR • REKLAMUHÚS • POSTBOKS 1099 • TINGHÚSVEGUR 47 • 110 TÓRSHAVN • TEL 355 355 • FAX 355 350 • SANSIR@SANSIR.FO • WWW.SANSIR.FO

Sansir eru eitt virki, ið tekur sær av heildar-samskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, so tað svarar til samleikan og mentanina hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina útsjónd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi.

Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samlaðu marknaðarføringini.
Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg